UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 3-5
100 Tórshavn

Dagfesting: **11. september 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-76**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 12/2020 frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu, eftir Tingskipanini § 52a. Fyrispurningur um íløgujáttan til Ítróttaháskúlan í Vági, settur landsstýrismanninum við uttanríkis- og mentamálum Jenis av Rana (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er ætlanin at játta 3 mió. kr. í íløgupeningi til Ítróttaháskúlan, soleiðis at skúlin fær nøktandi hølisumstøður, og møguleika at taka fleiri næmingar inn?
2. Um ja, nær er ætlanin at játta peningin?
3. Er samskifti millum Uttanríkis- og mentamálaráðið og Ítróttaháskúlan um nýggja skúlabygningin?

Svar

Til 1: Umboð fyri Ítróttaháskúlan í Suðuroy hava vent sær til Uttanríkis- og mentamálaráðið fyri at fáa gongd á aftur verkætlanina at gera ætlaða skúlabygningin. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur í hesum sambandi sett ætlaðu heimildarlógina fyri at veita stuðul til verkætlanina á løglistan í heyst.

Undir viðgerðini, sum hevur verið av verkætlanini, hevur Landsverk víst á nøkur viðurskifti við eitt nú kostnaðarmetingini og ætlaðu staðsetingini. Neyðugt er at viðgera hesi viðurskifti nærri, áðrenn endalig støða verður tikin til, um peningur skal játtast til hesa verkætlan.

Til 2: Øllum er greitt, at Ítróttaháskúlin í Suðuroy hevur tørv á betri hølisumstøðum, og er tað eisini ynski hjá landsstýrismanninum at tryggja hesum. Í løtuni ber ikki til at siga, nær peningur verður játtaður, tí sum nevnt verða nærri útgreinandi kanningar gjørdar.

Til 3: Ja, samskifti er við umboð fyri Ítróttaháskúlan um ætlanina at keypa og umbyggja eini eldri hús, Vaskiskúrin á Gørðunum í Vági. Kontrast hevur gjørt uppskot um umbygging og innrætting, og byggikøn frá Landsverki gera sum nevnt neyðugar kanningar av verkætlanini.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður